VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU síðunum
Nr. 111 - 15. juni 2005

# Føroyabanki – eitt val

**Fiskasløgini, sum alt sítt lív eru á Bankanum, veksa í miðal 27 % skjótari enn aðrastaðni, har hesi fiskasløgini finnast. Hjá teimum sløgum, sum ikki hava fast tilhald á sjálvum Bankanum, er vøksturin væl lægri. Hetta segði Eyðfinn Magnussen, sum hevur gjørt kanningar á Føroyabanka síðan 1992, í fyrilestri í Nóatúni í vár**




FØROYABANKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eyðfinn Magnussen starvast á Fróðskaparsetri Føroya og er útbúgvin biologur.

Heitið á fyrilestrinum, sum hann helt í Nóatúni, var: "Føroyabanki – eitt vakstrarparadís hjá fiski", og fyrilesturin byggir á tær kanningar, sum hann hevur gjørt á Føroyabanka.

Eyðfinn samanbar eitt nú vøksturin hjá fiski, sum livir á Bankanum í mun til, hvussu hesi fiskasløgini veksa aðrastaðni.

- Rákið er soleiðis háttað, at sjógvurin í stóran mun heldur seg inni á Bankanum. Á hendan hátt er Føroyabanki ein sjálvstøðugt vistfrøðilig skipan, har umhvørvið hevur sett síni serstøku eyðkenni á fleiri fiskasløg og aðrar livandi verur á Bankanum.

## "Bankatoskurin"

Eyðfinn vísti á, at kendasta av hesum er helst "bankatoskurin", sum hann verður róptur.

- Tað hevur leingi verið kent, at toskurin á Føroyabanka veksur óføra skjótt – ja, so skjótt, at hann telist millum skjótast vaksandi toskasløgini í heiminum.

Hann reisti eisini spurningin, hví toskurin á Føroyabanka veksur so skjótt? Er tað okkurt serligt við bankatoskinum, ella er tað umhvørvið á Bankanum, sum skapar tann góða vøksturin? Hesar áhugaverdu spurningar viðgjørdi Eyðfinn eisini í sínum fyrilestri.

## Eru umstøðurnar framúr góðar?

Eyðfinn segði, at tað serliga eru føði og hiti, sum stýra vøkstrinum hjá fiski, og somuleiðis hevur tann "genetiski komponenturin", sum hann tók til, eisini sín týdning.

- Jú, heitari sjógvurin er, og jú meira fiskurin hevur at eta, tess skjótari veksur hann. Men eru vakstrarumstøðurnar serstaka góðar á Bankanum, átti hetta tí eisini at sæst aftur hjá hinum fiskasløgunum, ið finnast har.

Til tess at fáa greiðu á hesum spurningi, hevur Eyðfinn kannað vøksturin hjá 14 ymiskum fiskasløgum á Bankanum og samanborið við, hvussu hesi fiskasløgini veksa aðrastaðni í heiminum.

- Samanberingin fevnir soleiðis um úrslit frá 62 ymiskum kanningum úr 35 ymiskum økjum. Tey 14 fiskasløgini vórðu býtt sundur í 2 bólkar: Tey sløgini, sum eru alt sítt lív á Bankanum og so tey ferðandi fiskasløgini, sum bert ein part av lívinum eru á Bankanum.

Hann helt fyri, at um tað er okkurt serstakt við umhvørvinum á Bankanum, kann væntast, at vøksturin hjá teimum fastbúgvandi fiskasløgunum skilir seg burtur úr vøkstrinum hjá




**Miðallongd á 3-ára gomlum toski** veiddur á ymsum havleiðum. Føroyabankatoskurin smæðist ikki burtur Longu í 1943 vísti danski fiskifrøðingurin Åge Vedel Tåning á, at toskurin á Føroyabanka vaks nógv skjótari enn á øðrum havleiðum í nánd av okkum.




Fiskasløgini, sum alt sítt lív eru á Bankanum, vaksa í miðal 27 % skjótari enn aðrasta
ikki hava fast tilhald á sjálvum Bankanum, ikki skilja seg so nógv burtur frá hesum fi